# Todi stórliga fagnaður

**Men føroyski álopsspælarin tykist ikki hava eins høga stjørnu hjá venjaranum, sum hann hevur hjá FCK viðhaldsfólkunum**

ÚTISSETI
*Jóannes Hansen*

Tað var ikki eiti á, sum teir knappliga seks túsund áskoðararnir, ið vóru í Parkini hóskvøldið, fagnaðu Toda Jónsson. FCK spældi í síðsta umfarinum í Royala bólkaspælinum á heimavølli móti IFK Gøteborg. Todi var ein av trimum álopsspælarum í FCK hópinum, og á heimasíðu síni, todi.fo, roknaði hann undan hóskvøldinum við, at tað vóru góðar vánir fyri, at hann fór at sleppa framat.

Umframt Toda vóru Jesper Bech og Peter Møller møguleikar í álopinum, og FCK venjarin, Hans Backe, gav hesum báðu seinast nevndu møguleikan. Í 2. hálvleiki fóru áskoðararnir at ótolnast, og teir góvu við taktføstum rópum til kennar, at teir vildu hava Toda Jónsson á vøllin. Harvið varð enn eina ferð staðfest, at Todi Jónsson er ógvuliga høgt í metum millum viðhaldsfólkini.

Hvussu høgt í metum føroyski landsliðsspælarin er hjá svenska FCK venjaranum er meiri ivasamt. FCK spældi væl, men tað gekk illa at fáa hol á. Serliga í borðunum báðum gekk tað væl at spæla seg ígjøgnum og at leggja góðar sendingar innfyri, men tað var bara eina ferð í 2. hálvleiki, at tað eydnaðist at fáa mál. Høgri vongverjin, Lars Jacobsen, sendi innfyri, og miðvallarin, Martin Berghold, sum er ein av nýggjaru monnunum, heilfluktaði við handara stólpan og í nettakið.

Álopsspælarin Jesper Bech var ofta við í uppspælinum, og hann hevði onkra roynd ímóti málinum, uttan at hann nakrantíð av álvara var vandamikil. Peter Møller sást ikki serliga nógv til. Undantøkini vóru, tá ið hann einar tíggju ferðir varð dømdur fyri at vera rangstaddur. Men Peter Møller eigur nógvan kreditt hjá FCK venjaranum.

### Framúr detalja

Tá ið einir tríggir minuttir vóru eftir av vanligu leiktíðini, slapp Todi Jónsson á vøllin. At halda 33 ára gamlan veteran, sum í átta ár hevur tænt felagnum, og sum fegin vil stríðast fyri at vísa, at tað framvegis er dugur í honum, so leingi á beinkinum, kann ikki tulkast nógv øðrvísi enn eitt slag av misáliti, og tað er undrunarvert, at sovorðið ikki hevur sinniliga ávirkan.

Men Todi Jónsson var eins fattur, sum hann altíð hevur verið, og tað var um reppið, at hann í teir smáu fimm minuttirnar, sum hann var á vøllinum, avrikaði dagsins detalju. Í trongari støðu megnaði hann eftir innlegg úr vinstru at temja við bringuni, so lyfti hann bóltin upp um tveir verjuspælarar, men tá ið hann so skuldi heilflukta við høgra beini, varð bólturin av mótstøðumanni beindur av vegnum.

– Eg eri fegin um, at eg slapp framat. Hvør fær møguleikan at spæla, og hvussu leingi hvør sleppur at spæla er upp til venjaran at gera av. Um tú sum spælari letur teg ávirka av avgerðunum hjá venjaranum, tí tú ikki ert samdur við honum, so hevur tú lítlar møguleikar í hesum høpinum, er einasta viðmerkingin hjá Toda Jónsson., sum gleðir seg um, at hann hevur førleikan at spæla og vónar, at hann næstu ferð fer at fáa meiri spælitíð, enn hann fekk hesa ferð. Sjálvandi er hann fegin um góðu móttøkuna, sum hann fekk frá viðhaldsfólkunum.

Hóskvøldið tapti OB 2-1 á heimavølli móti Malmø, Esbjerg megnaði 1-1 á Ullevål móti Vålerenga, og Brøndby vann 4-2 í Tromsø.

FCK er einasta av donsku feløgunum, sum hevur megnað at spælt seg víðari í Royalu liguni. Teir vunnu bólkin frammanfyri Gøteborg. Umframt hesi bæði eru hini fýra feløgini, sum framvegis eru við í kappingini, Rosenborg, Vålerenga, Malmø FF og Brann Bergen. Hesi verða nú flokkað í tveir bólkar. Spælt verður frá 3. mars og til 12. mai. Finalan verður fríggjadagin 26. mai.

# Dráttur kann avgerða alt

**Spenningurin er stórur í Vágum undan dystinum hjá Drátti móti oddaliðnum Mjølnir á Giljanesi sunnudagin. Vinnur Dráttur, hava tær sera góðan møguleika at gerast føroyameistarar, men vinnur Mjølnir, fer gullið óivað til Klaksvíkar**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Spenningurin er øgiligur í meistaradeildini hjá kvinnum, har trý lið liggja og stríðast um gullið. Sunnudagin verður dysturin millum Drátt og Mjølnir á Giljanesi ógvuliga avgerandi fyri, um gullið fer at enda í Klaksvík, í Vágum ella á Tvøroyri. Áhugin fyri flógbóltinum er vaksandi í Vágum, og tað hevði verið einki minni enn eitt bragd, um bæði føroyameistaraheitini hjá kvinnum og monnum í flogbólti í ár endaðu har vesturi.

### Heimaliðið hevur viðrák

Tað er einki yvir at dylja, at tað hevur ligið sera væl fyri hjá Drátti í seinastuni. Tær hava seinasta mánaðin vunnið á báðum hinum oddaliðunum á útivølli, og nú kunnu tær avgera alt sjálvar. Uppgávan hjá teimum er greið - vinna tær sínar írestandi dystir, so eru tær meistarar.

Fyrsta uppgávan á vegnum móti gullinum er so dysturin móti Mjølnir sunnudagin. Sum áðurnevnt hevur heimaliðið viðrák í løtuni, meðan tað er truplari at spáa um Mjølnir. Klaksvíksliðið var greitt við yvirlutan, tá ið tær fyri tveimum vikum síðani vunnu steypafinaluna á TB. Men viku seinni vóru tær í Trongisvági og spældu landskappingardyst, og tá vóru tað tvørakvinnur, sum vóru omaná og vunnu greitt 3-0. Spurningurin er so, um tær í Mjølnir eru mettaðar, ella um tær eru svangar eftir at fáa uppreisn fyri ósigurin í Trongisvági seinasta vikuskifti.

Um tað skuldi hent seg, at Dráttur vinnur dystin sunnudagin, so verður spenningurin ikki minni komandi vikuskifti, tá ið Dráttur aftur skal royna seg. Tá kemur TB nevnliga á vitjan, og so verður tað tann dysturin, ið allarhelst ger av, hvar meistaraheitið fer at enda.

Hinvegin er lítið at ivast í, at um Mjølnir vinnur dystin, so er kappingin avgjørd til fyrimuns fyri tær. Tað er nevnliga so, at tá ið hetta vikuskifti er farið aftur um bak, hevur Mjølnir tríggjar dystir eftir, og teir eru allir á heimavølli, og eru teir móti trimum teimum niðastu liðunum í deildini, sum neyvan megna at gera nakað við Mjølnir í Klaksvík.

Hitt oddaliðið, TB, skal hetta vikuskifti norður til Fuglafjarðar, har tær skulu royna seg móti ÍF á Kambsdali. Uttan at taka nakað frá fuglfjarðakvinnum, so er TB stórfavorittur at vinna dystin, tí ÍF hevur ikki somu styrki í ár, sum tær annars hava havt áður. Um TB skal gera sær nakrar vónir um meistaraheitið, so krevur tað, at Dráttur vinnur á Mjølnir sunnudagin, og trúfastu viðhaldsfólkini hjá TB fara óivað at verða líka spent upp á dystin á Giljanesi sum upp á dystin hjá TB á Kambsdali.

# Toppur móti botni

**Fult umfar er í Sunset kappingini hjá kvinnum um vikuskiftið, og millum annað skulu tey bæði toppliðini spæla á heimavølli móti teimum báðum niðastu liðunum**

SUNSET KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Landskappingin hjá kvinnunum er ikki komin líka langt sum kappingin hjá monnunum, og tí er spenningurin ikki eins stórur hjá teimum enn. Sum øll vita, eru tað tvey lið, Stjørnan og VB, sum burturav mynda toppin í føroyskum kvinnuhondbólti, og tað er als einki, sum bendir á, at liðini bæði fara at missa stig um vikuskiftið.

### Vandi fyri skrædli

Greipuvinnararnir úr Stjørnuni fáa sunnudagin vitjan av avgjørda botnliðnum, Tjaldur, sum enn hevur sítt fyrsta stig tilgóðar. Seinast Tjaldur royndi seg á útivølli móti øðrum av oddaliðunum báðum, var tá ið tær herfyri vóru í Vági og taptu 17-50 fyri VB.

Tað er neyvan nøkur loyna, at vandi er fyri einum líknandi úrsliti aftur sunnudagin, og tað er stórt spell fyri kappingina, at tað skal verða so stórur munur á tveimum liðum í somu deild.

Hinvegin kann tað eisini verða, at venjarin hjá Stjørnuni, Svein Rógvi Nielsen, fer at brúka dystin móti Tjaldur til at geva nøkrum av vanligu eykaleikarunum høvi at royna seg, og tí kann verða, at talan ikki verður um nakað skrædl.

Allir dystirnir í Sunsetkappingini um vikuskiftið verða leiktir sunnudagin, og í Vági fær VB vitjan av Kyndli. Havnarliðið hevur í tveimum teimum seinastu royndunum á heimavølli verið sera nær við at fáa stig móti ávíkavist Søljuni og VÍF, men stigini eru gloppin teimum av hondum í seinastu løtu. Útlitini hjá havnarliðnum til at fáa stig í Vági sunnudagin eru ikki góð, men VB kann vænta sær harðari mótstøðu frá teimum grønu, enn hvat tær hava fingið í hinum innanhýsis dystunum, ið liðini bæði hava leikt fyrr í kappingarárinum.

### Kann gerast spennandi í Vestmanna

Tann dysturin hetta vikuskifti, sum á pappírinum sær út til hava størst møguleika fyri at gerast javnur, er dysturin millum VÍF og Neistan í Vestmanna. Neistin má mestast sum favorittar at vinna dystin, men kvinnurnar úr Vestmanna eru væl betur fyri nú, enn tær vóru fyrr í ár, og á heimavølli við nógvum áskoðarum kunnu tær kanska gera ein vørr.

Seinasti dysturin er á Skála, har heimaliðið StÍF fær vitjan av Søljuni úr Vágum. Søljan liggur og berjist við Neistan um bronsumerkini, og um tær framhaldandi ætla at bjóða havnarliðnum av, so er allarhelst neyðugt hjá Søljuni at vinna á Skála.